# Vert at hugsa um

Nógv skal hugsast um áðrenn ein fer í gongd við at byggja hús ella at gera í stand. Her hava vit spurt sjey húsarhald, hvat tey halda er tað tydningarmesta at hugsa um.

**Tekst:** Rigmor Dam
**Myndir:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen og tey sjálvi



## Fylg væl við í byggingini og tak myndir av øllum

**Húsfólk:**
Andreas Mouritsen

**Hvar eru húsini?**
Í Hoyvík

**Slag av húsum:**
Hevur sjálvur teknað tey

**Hvør smíðar:**
Nakað sjálvur og annað handverkarar

**Góð ráð til teirra, sum fara undir at byggja:**
■ Ver úti um teg í góðari tíð at fáa tilboð frá handlum og handverkarum. Sum gongdin hevur verið seinastu tíðina, verður alt dýrari dag fyri dag.
■ Fylg væl við í byggingini og tak myndir av øllum
■ Hugsa um, hvussu húsini standa í mun til sólargang og ættir. Til dømis, at lívd er fyri bilinum, og hvønn veg rúmini venda. Til dømis er ikki gott, at køkur og stova venda norðureftir.



## Gerið heldur fá stór rúm í staðin fyri nógv smá

**Húsfólk:**
Jens Marni Hansen og Nina Brockie Hansen

**Hvar eru húsini?**
Húsini standa í Kollafirði

**Slag av húsum:**
Húsini eru eini eldri føroysk hús frá 1927 í trimum hæddum á 44 fermetrar hvør. Kvistur er á húsunum

**Hvør smíðar?**
Tey byggja sjálvi, men fáa hjálp til serligar uppgávur.

**Góð ráð til teirra, sum fara undir at gera eldri hús meira nútíðarhóskandi:**
■ Gerið heldur fá stór rúm, enn nógv smá. Í miðhæddini hava vit køk og stovu í einum, umframt gang. Áðrenn umvælingina vóru fýra rúm í miðhæddini.
■ Av tí at reisingin ikki er so høg, valdu vit, í staðin fyri brúsukliva, at fáa okkum eitt gosbað, sum tað eisini ber til at standa í, og tað eru vit sera glað fyri.
■ Eisini eru vit fegin um, at vit løgdu hita í gólvini í gongini og í baðirúminum.
■ Til tess at varðveita eitt sindur av gomlu sjarmuni við húsinum, hava vit latið bitarnar í køkinum verða verandi berar og ráðar, og síðani hava vit málað teir brúnar. Vit halda tað vera gott at varðveita okkurt av tí gamla stílinum.
■ Gomlu trægólvini vóru ikki nógv verd. Men áðrenn vit løgdu nýggj á, skrúvaðu vit krossvið niður á gomlu fjalarnar og omaná løgdu vit so nýggja parkettgólvið. Hetta gjørdu vit fyri at beinka gamla gólvið og fyri at sleppa undan, at gólvini ríkja so illa.
■ Vit hava fingið okkum plastvindeygu við sprossum. Tey líkjast akkurát trævindeygum, men krevja onki viðlíkahald.



## Hald teg væl við fólk sum arbeiða fyri teg

**Húsfólk:**
Andrea og John Arnfinn Reynstind og sonurin Brandur

**Hvar eru húsini?**
Í Sørvági

**Slag av húsum:**
Handverkarin hevur teknað húsini í samráð við húsfólkið

**Hvør smíðar?**
Nakað hava handverkarar gjørt og nakað hava tey gjørt sjálvi

**Góð ráð til teirra, sum fara undir at byggja:**
■ Royn at halda teg væl við fólk, sum arbeiða fyri teg og sum tú keypir frá. Tað lønar seg í síðsta enda.
■ Rinda fólkum, sum arbeiða fyri teg, allar rokningar beinanvegin.
■ Brúka tíð og orku til at kanna prísir ymsastaðni, teir kunnu vera sera ymiskir.